UTTAN ÚR HEIMI

## Fyrireika seg til kríggj

Norðurkoreanski verjumálaráðharrin hevur biðið landsins hermegi fyrireika seg til kríggj við USA.

Hósdagin vóru tíggju ár liðin, síðani fyrrverandi norðurkoreanski forsetin Kim Il Sung doyði, og tað var á einum minningarhaldi, at Kim Il Chol, verjumálaráðharri, bað landsins hermenn vera til reiðar at berjast við amerikanararnar. Hann segði, at hermenninir mugu fyrireika seg til at verja tað sosialistiska móðurlandið, og at herurin skal standa sum ein jarnmúrur um landið.

Kim Il Chol legði USA undir at fyrireika seg til at gera innrás í Norðurkorea, men at tað verður gjørt í loyndum. Hetta er annars ikki fyrstu ferð, at hann sigur USA fyrireika seg til leypa á Norðurkorea.

## Færri danir

Framrokningar í Danmark vísa, at danska fólkatalið fer at minka alla hesa øldina, og at um aldarskiftið verða umleið 700.000 færri fólk í Danmark enn nú.

DREAM-bólkurin, sum ger ymsar framrokningar fyri fleiri danskar ráðharrastovur, hevur fyrr mett, at fólkatalið fór at veksa hesa øldina. Í dag búgva 5,4 milliónir fólk í Danmark, og bólkurin hevur fyrr sagt, at talið verður 5,7 milliónir í 2100. Men nú stjórnin hevur gjørt tað truplari hjá fremmandafólki at búseta seg í Danmark, eru útlitini broytt, sigur bólkurin við Politiken. Fyri trimum árum síðani búðu 5.430.000 fólk í Danmark. Síðani hevur talið verið minkandi, og í 2100 fara 4,7 milliónir fólk at búgva í Danmark, vísa framrokningarnar hjá DREAM-bólkinum.

Í 2100 verða 22 prosent av øllum dønum av útlendskum uppruna, men DREAM-bólkurin sigur, at hevði stjórnin ikki havt hert útlendingapolitikkin, høvdu tey av útlendskum uppruna verið umleið ein hálv millión fleiri um hundrað ár.

## Dømdir fyri tikaradráp

Ein dómstólur í Kina hevur dømt tveir menn í fongsul, tí teir høvdu dripið og etið ein sibiriskan tikara.

Tað er ikki loyvt at drepa sibiriskar tikarar, tí stovnurin er so lítil. Men teir báðir kinesararnir høvdu kortini lagt eina tikarafellu uttan fyri heimbygdina í fjøllunum í Heilongijang-landspartinum. Almenna blaðið Shanghai Daily skrivar, at tá fellan hevði staðið nakrar dagar, kom ein sibiriskur tikari í hana. Tá hann hevði sitið í felluni nakrar dagar, fóru menninir eftir honum, drupu hann og ótu kjøtið. Nú hevur ein dómstólur givið teimum báðum monnunum níggju og fimm ára fongsul fyri tikaradrápið.

Altjóða grunnurin, sum arbeiðir fyri at verja hótt villdjór, heldur, at tað eru ikki meiri enn einir 500 villir sibiriskir tikarar eftir í landnyrðingspartinum av Kina og har eysturi í Russlandi. Hóast myndugleikarnir í Kina og Russlandi hava bannað monnum at veiða sibiriskar tikarar, verða fleiri veiddir á hvørjum ári, skrivar Shanghai Daily.

## Seyðin burtur frá vegnum

Tað er ikki bara í Føroyum, at seyðurin hevur hug at leggjast fram við vegnum. Nógvastaðni í Noregi er myndin tann sama, men í hvussu er ein bóndi hevur sett sær fyri at loysa tann trupulleikan.

Alf Moe Carstens, sum er bóndi á Tromsø-leiðini, sigur við blaðið Nordlys, at hvør einasti seyður, sum heldur til við vegin ella niðri í fjøruni, verður tikin. Hann viðgongur, at tað er ikki lætt at venja seyðin at halda seg burtur frá vegunum, tí hevur eitt lamb verið har saman við mammuni, fer tað aftur hagar seinni. Kortini hevur hann valt at halda fast við avgerðina um at drepa tað, sum fer oman til vegin.

– So seyðurin hevur einki í at velja. Fer hann tríggjar ferðir oman til vegin, verður hann tikin og sendur beinleiðis í sláturhúsið, sigur Alf Moe Carstens.

# Nú hóttir hann aftur USA

**Amerikonsku myndugleikarnir siga seg hava upplýsingar um, at al-Qaeda fyrireikar eitt álop á USA**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Úr fjøllunum á markinum ímillum Afghanistan og Pakistan hóttir Osama bin Laden nú aftur við at leypa á mál í USA*

Um stutta tíð fer yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda at søkja at onkrum máli í USA.

Tað segði ein amerikanskur embætismaður við blaðið New York Times í gjár. Embætismaðurin segði, at USA hevur upplýsingar um, at al-Qaeda fyrireikar eitt álop, og at leiðslan í felagsskapinum er við í fyrireikingunum.

Sambært embætismanninum halda amerikanararnir, at Osama bin Laden er virkin framvegis, og at hann heldur til einastaðni í fjøllunum á markinum ímillum Afghanistan og Pakistan. Hann legði afturat, at fregnartænastan CIA er vitandi um, at bin Laden hevur havt samband við fleiri av sínum monnum, og at hann hevur biðið teir fyrereika eitt álop.

Fyrradagin segði amerikanski trygdarmálaráðharrin, Tom Ridge, at al-Qaeda fer at leypa á mál í USA í sambandi við forsetavalið í heyst. Sambært ráðharranum hevur CIA boðað frá, at valstríðið upp undir forsetavalið er eitt álopsmál hjá al-Qaeda.

# Nógv donsk fiskiskip skulu høggjast upp

**Ongantíð hava so nógvir danskir reiðarar søkt um upphøggingarstuðul sum í ár, og vandi er fyri, at fleiri av teimum gonlu fiskivinnuhavnunum hvørva**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fiskivinnan í Danmark er í kreppu. Stórari kreppu. Meiri enn 200 reiðarar hava søkt tað almenna um upphøggingarstuðul, og so nógvar umsóknir hava myndugleikarnir ikki fingið í mong ár.

Serliga í Norðurjútlandi hava nógvir reiðarar valt at geva skarvin yvir, og har er vandi fyri, at summar av teimum gomlu fiskivinnuhavnunum fara at hvørva. Einaferð var Lemvig ein av teimum stóru fiskivinnubýunum. Nú eru bara níggju skip eftir har, og av teimum hava fýra søkt um upphøggingarstuðul. Tað eru bankarnir, sum krevja skipini upphøgd, tí tey klára ikki sínar skyldur, skrivar Jyllandsposturin.

– Verða tey fýra skipini upphøgd, hava vit bara fimm eftir, og tað er ov lítið til at reka ísvirkið, fiskamarknaðin og bedingina í býnum, sigur formaðurin í fiskimannafelagnum í Lemvig, Jens Søndergaard, við blaðið. Hann leggur afturat, at skipini útvega nógv arbeiði uppi á landi, so tað er ein vanlukka fyri allan býin, steðgar virksemið í fiskivinnuni.

Formaðurin í danska fiskimannafelagnum, Thorkild Førby, er dapurskygdur. Hann sigur, at tað er sera óheppið, verða so nógv skip upphøgd. Veksa fiskastovnarnir aftur, sleppa danir ikki at byggja nýggj skip, tí ES-reglurnar forða tí, sigur hann.

Í matvørumálaráðnum hava tey bara 50 milliónir krónur til upphøggingarstuðul, men har eru tey sinnað at finna meiri pengar, so fleiri skip kunnu høggjast upp.

# Olympiski eldurin elvdi til politiskt split

**Tann olympiski eldurin verður roknaður sum tað fremsta teknið um frið og semju. Men á Kýpros elvdi hann til politiskan spenning.**

Í næsta mánað byrja teir olympisku summarleikirnir í Athen, og ta seinastu tíðina hevur tann olympiski eldurin verið á veg til grikska høvuðsstaðin. Nú um dagarnar kom eldurin til Kýpros, sum var tað seinasta staðið, sum fekk vitjan av eldinum, áðrenn hann kom til Grikkalands.

Men á Kýpros hendi tað, at stjórnin í tí turkiska Norðurkýpros kravdi at sleppa at fyrireika eitt alment hátíðarhald í sambandi við, at tann olympiski eldurin kom til oynna. Tað kravdi millum annað, at eldurin skuldi berast eina aðra leið enn upprunaliga ætlað, men altjóða olympiska nevndin segði nei. Grundgevingin hjá nevndini var, at hon leggur seg ikki út í tað politiska stríðið á oynni.

Bara Turkaland hevur viðurkent tann norðara partin av Kýpros sum sjálvsstøðugt ríki.

ítróttur
Nr. 130 • leygardagur • 10. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hart lív at rógva

**Annað árið eru FM stevnurnar sjey í tali. Talið á stevnum hevur økst so líðani upp gjøgnum árini, so tað munnu rógvararnir ikki hava merkt so væl. Men fyri fyrstu ferð nakrantíð verður róð seks FM stevnur út í eitt**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Kappróður er ein sera hørd ítróttargrein, men kortini verða rógvararnir so tiknir av henni, at flestu teirra halda fram í fleiri, fleiri ár*
*Savnsmynd*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hava rógvarar luttikið á FM stevnum seks vikuskifti út í eitt. Hetta er nakað, sum ongin hevur royndt fyrr, men sjálvandi hava nøkur helst luttikið á bygdastevnum, sum tó ikki telja við hóast alt.

Men sum sagt, so er hetta, við seks stevnum út í eitt, nakað spildurnýtt. Summi vilja vera við, at tað hoyrist meira um skaðar í ár enn undanfarin. Av tí sama verður hvíldin tað minni, tá tað skal venjast hvørja viku til stevnu.

Um hetta er rætt ella ikki, skal her verða ósagt, men tað er ein sannroynd, at fleiri av manningunum hava upplivað, at tey missa ein av teirra rógvarum í eitt tíðarskeið vegna ryggskaða ella okkurt annað.

### Stutt ár

Hóast kappróður valla kann sigast at hava ein langt kappingarár, er talan um eitt hart ár. Venjingin hjá summum byrjar longu í januar, og gerst hon bara alt harðari og harðari so hvørt sum tað líður móti sumri.

Einans sjey dystir, so er kappingin avgjørd. Eirindaleyst? Kanska, men um vit taka fótbóltin sum eitt dømi, so hevði tað neyvan borið til at havt 18 FM stevnur í kappróðri.

Kappróður verður skýrdur at vera ein tann harðasta ítróttargreinin, sum er til. Tað er helst ikki so langt frá veruleikanum. Um hugt verður at manningunum, tá tær eru lidnar at rógva, er ikki nógv eftir av teimum ta fyrstu løtuna. Og so ikki at gloyma árabløðrurnar og bekksárini, sum hvør tann einasti rógvari stríðist við tær fyrstu vikurnar, eftir at venjingarnar í bátinum eru byrjaðar.

Tað kann til tíðir vera nærum óhugnaligt at hyggja í eyguni á einum rógvara, sum hevur givið alt. Men á ein ella annan hátt, so rúnarbindur hendan ítróttin tey flestu, sum royna hana.

Einaferð segði ein rógvari, at kappróður er soleiðis, at antin elskar tú tað, ella hatar tú tað.

### Økir spenningin

Inntil einaferð miðskeiðis í nítiárunum vóru tað einans fimm stevnur, sum taldu við í FM. Hetta varð hildið at vera ov lítið, tí FM kappingin kundi verða avgjørd aftaná einans tríggjar stevnur. Tá kom so sundalagsstevnan við í FM og í fjør kom so sjeynda FM stevnan, sum kallast fjarðastevna og skiftir ímillum Vestmanna, Skála og Strendur.

Tað letur til at vera nøgdsemi millum rógvararnar kortini um, at so nógvar stevnur telja við. Hetta økir jú um spenningin og møguleikarnar hjá teimum ymsu at gera seg galdandi, eru góðir, hóast byrjanin ikki er so góð.

Vit hava spurt nakrar rógvarar, sum hava róð í fleiri ár, um tað er øðrvísi, nú so nógvar stevnur eru upp í slag. Svarini hjá teimum síggjast niðanfyri.

## Uni Oknadal, rør við Nevinum Reyða



**Situr á lærinum, bakborð**

*Hvat heldur tú um, at tað eru sjey FM stevnur?*
– Tað er deiligt. Sjálvandi skulu tað vera nógvar stevnur, tí tað er betur at sleppa at kappast oftani. Tað grundi eg á, at tað er so nógv venjing, og tekur tú samlaða minutt talið á stevnuróðrum og venjingum, so kundi tað komið nógv meiri burturúr.

*Er tað strævnari í ár, nú seks stevnur eru út í eitt?*
– Tað havi eg ikki beinleiðis hugsað so nógv um. Tað er bara gott, at tað eru nógvar stevnur, men sjálvandi merkist tað fyri familjuna. Man hevur ikki ta somu tíðina við hús.

*Væntar tú, at talið á stevnum fer at økjast meira?*
– Nei, tað verður tað ikki, sum nú er. Tað er ein reglugerð, sum sigur, at tað skal vera eitt frítt vikuskifti undan ólavsøku, um tað skuldi verðið neyðugt at flutt ein róður. So um tíðarskeiðið skal vera tað sama, fer tað ikki at bera til. Men tað kundi verðið gott, um tað blivu fleiri.

*Hava tit havt nógvar skaðar umborð hjá tykkum?*
– Ja, vit hava verið nógv merktir av skaðum. Fleiri hava mist fleiri venjingar orsakað av skaðum. Og eg haldi, at tað hava verið fleiri í ár enn undanfarin ár. Men tað veldst jú um, hvussu persónarnir eru.

*Hvat tippar tú til róðurin í dag?*
– Eg vænti, at vit vinna. So verður Argjabáturin nummar tvey og Kvívíkingur nummar trý. Sjálvt um eg onki hevði havt í móti, at tað varð umvent har.

## Martin Venned, rør við Eysturoyingi



**Situr á toftini, stýriborð**

*Hvat heldur tú um, at tað eru sjey FM stevnur?*
– Tað dámar mær væl. Tað áttu faktiskt at verið fleiri, tí tað er gott at kappast nógv. Harvið fæst nógv meira burtur úr kappróðrinum. Og um ein tapir eina av teimum fyrstu stevnunum, so hevur ein betur møguleika til at vinna tað tapta innaftur við nógvum stevnum.

*Er tað strævnari í ár, nú seks stevnur eru út í eitt?*
– Tað havi eg ikki hugsað so nógv um, so nei, tað haldi eg ikki.

*Væntar tú, at talið á stevnum fer at økjast meira?*
– Eg vænti ikki, at tær fara at økjast í tali. Kappróður er so fokuseraður upp á stevnur, sum er, og tað er ikki pláss fyri fleiri stevnum, so sum umstøðurnar eru nú, trúgvi eg ikki, at talið fer at økjast. Men tað kundi verðið gott, haldi eg. Tí so kanska man kundi flutt fokus frá stevnum og gjørt føst FM øki at rógva kapp á og havt munandi fleiri kappingar.

*Hava tit havt nógvar skaðar umborð hjá tykkum?*
– Nei, vit hava ikki havt nógvar skaðar í ár.

*Hvat tippar tú til róðurin í dag?*
– Eg vænti, at Eysturoyingur fer at vinna. So verður Nólsoyingur nummar tvey og Havnarbáturin nummar trý.

## Maiken Johannesen, rør við Havfrúnni



**Situr á lærinum stýriborð**

*Hvat heldur tú um, at tað eru sjey FM stevnur?*
– Eg haldi, at tað er nokk so strævið. Kappingarárið verður so langt, men annars haldi eg, at tað er fínasta slag.

*Er tað strævnari í ár, nú seks stevnur eru út í eitt?*
– Ja, tað er ræðuliga strævið, haldi eg.

*Væntar tú, at talið á stevnum fer at økjast meira?*
– Nei, tað vænti eg ikki. Í øllum verður talan um eitt øgiliga langt kappingarár, um so verður.

*Hava tit havt nógvar skaðar umborð hjá tykkum?*
– Ja, onkur hevur havt skaða, men tað hevur ikki verið so nógv kortini.

*Hvat tippar tú til róðurin í dag?*
– Vit ætla okkum sjálvandi at vinna, vit vóru jú so nær við seinast. Men annars vænti eg, at Blikur og Sílið eisini fara at verða frammarlaga. Og kanska Firvaldur eisini.